## Ikki rangstøða

Danskir dómarar eru ósamdir á máli, tá tosið fellur á leiðslumálið, sum Ruud van Nistelrooy skoraði móti Italia í gjár. Í upptaktini til málið rendi italskur verjuspælari seg í málverjan, og endaði tí aftan fyri baklinjuna. Men hjálpardómarin í dystinum metti tó ikki, at spælarin við hesum var uttan fyri spælið. Og hesum er danski Claus Bo Larsen púrasta samdur í. – Tað er sera einfalt. Um tú ikki ert skaddur og við dómarans loyvi er farin av vøllinum, so ert tú í spælstøðu, og tí var málið í lagi, sigur Claus Bo Larsen við Ekstra-Bladet.



## Rangstøða

Knud Erik Fisker, sum í fleiri ár var eitt av altjóða donsku dómaraumboðunum, er als ikki samdur við Claus Bo Larsen, tá tosað verður um Ruud-málið .- Eg hevði við 100% vissu dømt rangstøðu. Og tað vóni eg so sanniliga eisini, at hjálpardómarin hjá mær hevði gjørt. Italiumaðurin rennur saman við sín egna málverja, og harvið verður hann – uttan at vilja tað – settur uttan fyri spælið. Hann verður jú eisini liggjandi uttan at hava nakra sum helst ávirkan, so eg eri als ikki í iva um, at talan var um rangstøðu, sigur Knud Erik Fisker við Ekstra-Bladet.

B68-EB/Streymur 0-3 (0-1):

# Tvey umfør undan restini

*B68*

*EB/Streymur*

**Við sigrinum á B68 er EB/Streymur nú sjey stig undan næstu liðunum, og sum formbarometrini sveiggja tykist spurningurin vera, hvør kann nerta sundalagsmenn**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Góða gongdin hjá B68 steðgaði við eitt brak, tá teir í gjárkvøldið tóku ímóti oddaliðnum, EB/Streymi.

Og sum so var ikki tað stóra, sum toftamenn kundu seta fingurin á, tá alt kom til alt. Gaman í hevði B68 í longum løtum av dystinum bóltin fult so nógv, sum mótstøðan hevði tað, men tað gekk tó munandi skjótari fyri seg, tá EB/Streymur søkti at heimamálinum.

### Arnbjørn ajour

Sum ikki einaferð, so var Arnbjørn Hansen stóra hóttanin móti mótstøðuni. Og við tveimum málum eydnaðist honum at koma ajour aftur, soleiðis at hann aftur hevur eitt meðaltal upp á eitt mál fyri dystin.

Ávaringarnar vórðu longu sendar, tá Arnbjørn hevði stútað á tvørtræið tíðliga í dystinum, og eftir lítlum korteri var vandamikli maður hægstur eftir hornaspark, soleiðis at bólturin varð beindur í meskarnar.

Støðugt royndi EB/Streymur at søkja meira at málinum hjá B68, sum eisini uttan stórvegis hepni royndi at svara aftur. Men tað var ikki fyrr enn eftir steðgin, at dysturin varð punkteraður.

Aftur var tað Arnbjørn, sum var á rætta staðnum, tá hann við høvdinum stýrdi bóltinum inn um handara stólpa, og tá Bárður Olsen lítlan seinni økti við dundurskoti, var púrasta leyst og liðugt.

### Myndamaðurin útihýstur

Fyri okkum her á blaðnum – og kanska eisini fyri lesarum – var tó spell, at myndamaður okkara ikki fekk atgongd til dystin. Eitt total-forboð móti gratistum tykist vera sett í verk á Toftum, og tað bar við sær, at hvørki bilur ella myndamaður hjá Sosialinum slapp inn á Stadion-økið uttan at gjalda. So hesa ferð má lesarin vera myndina fyriuttan.

### FAKTA um dystin

**B68-EB/Streymur 0-3 (0-1)**
0-1: Arnbjørn T. Hansen, 14.
0-2: Arnbjørn T. Hansen, 51.
0-3: Bárður Olsen, 53.
**Dómari**: Eiler Rasmussen
**B68**: Vlada Filipovic – Kristian Anthon Andreasen, Niklas Poulsen, Arnbjørn Danielsen, Øssur Hansen – Jóan Símun Edmundsson (Emil Olsen, 63.), Jann Ingi Petersen, Ndende, André Olsen (Jonleif Højgaard, 63.), Keita – Jacob Bymar
**Gult kort**: eingin
**EB/Streymur**: René Tórgarð – Levi Hanssen (Fróði Clementsen, 67.), Egil á Bø, Marni Djurhuus, Leif Niclasen – Hanus Eliasen (Tonny Kruse, 83.), Brian Olsen, Bárður Olsen, Hans Pauli Samuelsen – Arnbjørn T. Hansen (Marcel Balog, 78.), Sorin Anghel
**Gult kort**: eingin

**Dómarabókin**

| Feløg | | GK | RK | Stig |
|---|---|---|---|---|
| ÍF | | 25 | 3 | 34 |
| B71 | | 19 | 3 | 28 |
| B36 | | 19 | 1 | 22 |
| Víkingur | | 22 | 0 | 22 |
| KÍ | | 16 | 1 | 19 |
| Skála | | 19 | 0 | 19 |
| B68 | | 17 | 0 | 17 |
| HB | | 13 | 1 | 16 |
| EB/S | | 12 | 1 | 15 |
| NSÍ | | 15 | 0 | 15 |
| **Spælarar** | | | | |
| Símin Hansen | B71 | 1 | 2 | 7 |
| Alexander Jovevic | ÍF | 0 | 2 | 6 |
| Hans Jørgen Djurhuus | Víkingur | 6 | 0 | 6 |
| Balazs Sinko | ÍF | 2 | 1 | 5 |
| Vali Miela | Skála | 5 | 0 | 5 |
| Hanus Thorleifsson | B36 | 1 | 1 | 4 |
| Wellington Soares | B71 | 1 | 1 | 4 |
| Fróði Benjaminsen | HB | 1 | 1 | 4 |
| Rodrigo | KÍ | 1 | 1 | 4 |
| Gudmund Nielsen | B71 | 4 | 0 | 4 |
| Bartal Eliasen | ÍF | 4 | 0 | 4 |
| Høgni Madsen | ÍF | 4 | 0 | 4 |
| Pætur Dam Jacobsen | Skála | 4 | 0 | 4 |
| Atli Gregersen | Víkingur | 4 | 0 | 4 |
| Magnus Skoralíð | Víkingur | 4 | 0 | 4 |

Í yvirlitinum telur gult kort 1 stig. Reytt kort telur 3 stig

**Formula-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 10 | 8 | - | 2 | - | 0 | 24 | 8 | 16 | 26 |
| 2 HB | 10 | 5 | - | 4 | - | 1 | 22 | 8 | 14 | 19 |
| 3 B36 | 10 | 5 | - | 4 | - | 1 | 14 | 5 | 9 | 19 |
| 4 NSÍ | 10 | 4 | - | 3 | - | 3 | 14 | 13 | 1 | 15 |
| 5 Víkingur | 10 | 3 | - | 3 | - | 4 | 16 | 14 | 2 | 12 |
| 6 KÍ | 10 | 2 | - | 5 | - | 3 | 13 | 17 | -4 | 11 |
| 7 B68 | 10 | 3 | - | 2 | - | 5 | 8 | 15 | -7 | 11 |
| 8 ÍF | 10 | 3 | - | 1 | - | 6 | 14 | 22 | -8 | 10 |
| 9 Skála | 10 | 1 | - | 4 | - | 5 | 7 | 18 | -11 | 7 |
| 10 B71 | 10 | 1 | - | 2 | - | 7 | 10 | 22 | -12 | 5 |

**Máltindarnir**

| Formula-deildin | | |
|---|---|---|
| Arnbjørn Hansen | EB/S | 10 |
| Christian Høgni Jacobsen | HB | 7 |
| Andrew av Fløtum | HB | 6 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 5 |
| Rodrigo | KÍ | 5 |
| Andreas Lava Olsen | Víkingur | 5 |
| Karoly Potemkin | B36 | 4 |
| Bartal Eliasen | ÍF | 4 |
| Bergur Midjord | B36 | 3 |
| Jann Ingi Petersen | B68 | 3 |
| Bárður Olsen | EB/S | 3 |
| Sasa Jovanovic | ÍF | 3 |
| Hjalgrím Elttør | NSÍ | 3 |
| Jónhard Fredriksberg | NSÍ | 3 |
| Óli Hansen | NSÍ | 3 |
| Øssur Dalbúð | NSÍ | 3 |
| Obele Okeke Onyebuchi | Skála | 3 |

Besti málskjúttin í Formula-deildini fær eftir kappingarárið gylta skógvin frá Thomas Dam Ítrótti